# HEILSANIR





Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum

30?? Segði nakar 30 ?? Nei tað kann ikki passa... Ella hvat?? Hvat halda tit? Síggi eg virkiliga út til at verða 30 ár??







Chokerað?? Ja hvør vildi trúð tí, at hesin fitti beiggin rundar tey 30 í dag. Hjartaliga tillukku við degnum.
**Heilsan vit her uppi**




Nú góði, byrjar aldurin longu at taka yvir. Hjartaliga tillukku við tí runda degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan vit í Froðba**




**Allarbesti Pætur**
Tillukku við 4 ára degnum 14. sept. Her ætlar tú tær nokk at skora mál fyri Manchester.
**Kærastu heilsur vit í Kinn**


Sosialurin Heilsanir kr. 30,-

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ________________________________________

Bústaður: ________________________________________

Bygd/býur: ________________________ Tlf.: __________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<




*framhald av síðu 11*

ilju síni í 1995 flýddi úr Kroatia um Bosnia og inn í Serbia, áðrenn familjan kom til Íslands at búgva.

- Vit búðu í serbiskum parti av Kroatia. Pápin var serbi og mamman kroati. Vanliga verða serbar róptir ortodoksir og kroatar katolikkar.

Zeljka sigur, at tá ið politiska stríðið tók seg upp í landspørtunum, sum áður vóru partar av gamla Jugoslavia, var ikki tespiligt at vera serbi í Kroatia.

## Rikin burtur

- Kroatar, sum vildu hava sjálvræði, vildu hava okkum serbar út úr landinum. At enda gjørdist støðan hættislig hjá okkum, tí kroatar gjørdu seg beinleiðis inn okkum við skotvápnum, granatum og bumbum.

Hon sigur, at tá ið flestu serbisku familjurnar, sum búðu um teirra leiðir, flýddu úr Kroatia um morgunin – ella vórðu dripin, kundu tey ikki fara, tí pápi hennara stríddist á hermótinum við serbum ímóti kroatum.

- Dagin og náttina fyri, at pápi kom heim aftur til okkara, krógvaðu vit okkum tað mesta av einum samdøgni undir eini betong trappu í húsum okkara. Vit kendu hitan og luktin frá granatunum og bumbum, sum fullu beint við hús okkara. Vit hoyrdu hermenn rópa og skrýggja.

## Særdur pápi

Zeljka sigur, at tá ið pápin umsíðir kom aftur, var hann illa særdur av granat splintum, sum høvdu meiðslað bæði bein, armar og høvur.

- Hann var illa særdur og bløddi illa.

Hon sigur, at so skjótt pápin var aftur komin, fóru tey undir flýggjanina, sum tilsamans vardi í 12 dagar – gjøgnum skógarlendi í Kroati, um Bosnia og inn í Serbia.

- Á hesi ferðini stríddust vit fyri lívinum, og vit væntaðu nógvar ferðir, at okkara seinasta løta var komin. Vit møttu herfólki á leiðini, men vit sóu ikki mun á, um hesir vóru kroatar ella serbar. At páp var serbi, hjálpti okkum, tá vit møttu serbum á vegnum og tað eydnaðist okkum eisini at sleppa undar kroatunum við lívinum.

Zeljka sigur, at ymsastaðni á vegnum sluppu tey upp í traktorar, og onkur hevði mat, sum tey kunnu fáa.

- Ein gomul kona, sum búði í okkara grannalagi var eisini í fylgi við okkum og hon tók sær væl at pápa mínum. Pápi royndi a binda um sárini sum frægast, og á vegnum møttu vi eisini sjúkrasystir, sum hjálpti pápa við sárunum.

## Til Íslands

Undir flýggjanini helt páp Zeljku fyri, at um tey sluppu við lívinum, skuldu tey flyta til eitt land, sum hevur kross í sínum flaggi.

- Vit búðu fyrst í flóttafólkalegu í Serbia og seinn í húsum hjá niðurlendskum fólki, sum vóru í Serbia og hjálptu flóttarfólki.

Zeljka Krístín Klobucar hevur nú búð í Íslandi fleiri ár, og hon tosar væ íslendskt. Hon hevur arbeit á Ørkini í hálvt triðja ár.

- Nú umstøðurnar Kroatia eru broyttar, hava vit vitjað aftur í barnaheim okkara, sum vit framvegis eiga og brúka sum summarhús. Upp í søguna um Zeljku hoyrir eisini, at hon seinni er gift kroata, sum hon møtti á einum av teirra vitjanum í heimlandinum.

- Pápi helt ikki nógv um sjeikin í byrjanini, tí hann er kroati, men vit eru ikk rasistar, og í dag er alt fínasta lagi, sigur Zeljka Krístín Klobucar, sum undir vitjanini á Vestnorden Travel Mart er vorðin rættiliga hugtikin av Føroyum og føroyingum, sum hon sjálvsagt eisini kennir úr Íslandi.